

# TØKK

Hjartaliga tøkk til tykkum mongu, familju, vinir, kenningar, sum á ymsan hátt sýndu samkenslu, stuðlaðu og hjálptu okkum í stóru sorg okkara, tá høgt elskaði maður, pápi, verfaðir og abbi okkara

**Símun Martin Poulsen**
**Skála**

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk til Jógvan Fríðriksson, Poul Færø og Sylverius Jacobsen fyri troystarík orð í kapellinum og í kirkjuni.
Tøkk til kirkjutænarar, berarar og gravara og til tykkum, sum lótu bussar og fingu ljóð út til teirra við kirkjuna.
Tøkk til tykkum øll, sum á ymsan hátt hjálptu til við jarðarferðina og ervið. Tøkk til Paula Høj og tykkum í Kelduni, sum tóku tykkum so væl av ervinum. Tøkk fyri blómur, kransar og peningagávur.
Tøkk til tykkum mongu, sum fylgdu Símun Martin til hansara seinasta hvíldarstað her á fold.

***Familjunnar vegna***
**Martina**
**Fróði, Volmar og Annbritt**



# TØKK

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu og umsorgan, tá okkara høgt elskaði maður, pápi, sonur, verfaðir, abbi og bróðir

**Regin Olsen**
**Tórshavn**

andaðist og fór heim til Harran

Hjartaliga tøkk til tykkum, sum vóru um hann á Lágargarði og á Landssjúkrahúsinum.
Tøkk til Derhard Jógvansson, prest, og Bergur Debes Joensen, prest, fyri góð og troystarrík orð í kapellinum, kirkjuni og á grøvini. Tøkk til Jensinu Olsen og Argjakórið fyri yndisligan sang. Tøkk til kirkjutænarar, berarar, sangarar og organistar. Tøkk til tykkum, ið á ein hvønn hátt hjálptu so væl til við ervinum. Tøkk fyri blómur, kransar, heilsanir, vitjanir og peningargávur til Meinigheidshúsið í Havn.
Hjartaliga tøkk til tykkum mongu, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað her á fold.

***Vegna tey avvarðandi***
Hella
**Niels Juel, Liljan og Randi Jensina**

*Luk. 23,43 Og hann segði við hann: Sanniliga sigi eg tær, í dag skalt tú vera við í Paradís*

# TØKK

Vit takka hjartaliga fyri sýnda samkenslu og hjálpsemi, tá elskaði maður, pápi, verpápi, abbi og bróðir okkara

**Napoleon H. A Hansen**
(vanliga nevndur Poli)

**andaðist og varð jarðarður.**

Tøkk til prestar, sangarar, organistar og gravarar.
Tøkk til Petur Hans og Kim fyri teirra vakra sang í kirkjuni.
Tøkk til kirkjukórið fyri vakran sang og stóra hjálp við ervinum.
Tøkk til tykkum á B6, sum vóru til stóra hjálp fyri Pola og okkum øll.
Takk fyri blómur, kransar og peningargávur til Krabbameinsfelagið.
Tøkk til tykkum, sum á ymsan hátt hjálptu til við ervinum.
Tøkk til tykkum øll, sum fylgdu Pola til hansara seinasta hvíldarstað her á fold.

***Familjunnar vegna***
**Birgit**
**Kim og Sólrun**
**Jonna og Ulla v/familju**

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at okkara elskaði maður, pápi, verfaðir og abbi

**Tórur Reinert**

andaðist mikudagin 6. apríl, 62 ára gamal.

Jardarferðin verður úr Vesturkirkjuni mánadagin 11. apríl kl. 13.00.

***Vegna tey avvarðandi***
**Emmy, Winnie, Elsa og Margit**

Tey, sum vilja minnast Tóra við blómum ella kransum, kunnu ístaðin lata eina gávu til Heilafelagið, konto í Eik Banka.



# Fegnast um nýggjar tónar frá SEV

Føroya Náttúruverndarfelag, FNU, fegnast um nýggjar tónar frá SEV viðvíkjandi vatnorkuútbygging í Føroyum.

– Víkarætlanin er fyribils útsett, og SEV vendir eyguni móti vindorku ístaðin. Vit ivast ikki í, at tað eru hópin av føroyingum, sum fegnast líka nógv sum FNU, og sum fara at fylgja væl við gongdini framyvir, sigur FNU í tíðindaskrivi.

FNU hevur tó eina rúgvu av evnum, sum tey ynskja at seta á breddan, og hava brúk fyri fleiri virknum limum, so lyftast kann í felag.

– Úr rúgvuni kunnu vit t. d. endur- og gagnnýtslu av náttúrutilfeingi, ymisk vard økir runt um í Føroyum, lívfrøðiligt margfeldi – umframt stórmál sum Náttúrufriðingarlógin, sum enn ikki er samtykt og stovnan av tjóðgarði í Føroyum, sigur felagið.

Tann 20. apríl klokkan 19 verður aðalfundurin í felagnum hildin í Bládýpinum í Tórshavn.

Skráin til fundin verður hendan:

1. Ársfrágreiðing nevndarinnar.
2. Roknskapur fyri seinasta rakstrarár felagsins.
3. Limagjald fyri komandi ár.
4. Val av 2 nevndar og 1 tiltakslimi sambært grein 8.
5. Ymiskt.